## Náttúran og menniskjað

**Miðsummarhaldið í Klaksvík, sum nú verður fyri 17. ferð, verður hildið jóansøkudag, fríggjadagin 24. juni**

MIÐSUMMAR

Sjálvt um várið og tað sum er farið av sumrinum hevur roynst illa við veðri, so livir altíð vónin um betri veður. Tað er m.a. tí, at vit skipa fyri tílíkum tiltøkum, at fagna summarinum og tí ljósu tíðini, ið sólin og náttúran gleðir okkum við hesa ársins tíð. So sjálvt um vit ikki higartil í ár ikki kunnu siga at vit hava merkt so nógv til summarið, so vilja vit tó fagna summarinum og aftur í ár savnast í Grøvini, har vit hugna okkum saman og gleðast um náttúruna, og tað hon hevur at geva okkum.

Veðurforsøgnirnar siga frá hampiligum veðri, so ikki nýtist nøkrum at setast aftur.

Sum vanligt tendra skótarnir eldarnar kl. 15 í Grøvini, har høvi verður hjá børnum og vaksnum at hugna sær til kvøldið kemur.

Kl. 19 verður miðsummarrøðan, og í ár verður tað Hans Hjalti Skaale, býargartnari, ið fer at halda røðuna.

Eisini verður sungið úr sangheftinum.

Aftaná verður ein gongutúrur út í náttúruna. Seinastu tvey árini hevur túrurin verið niðan á Myrkjanoyrarfjall. Men illa hevur viðrað. Báðu ferðir eru vit ikki komin longri niðan enn á Kjølin, tí tjúkt hevur verið í erva. Í ár verður so roynt fyri triðju ferð.

Skótaliðini í Klaksvík saman við Norðoya Fornminnafelag skipa fyri miðsummarhaldinum. Eisini stuðlar Klaksvíkar kommunu tiltakinum.

Vælkomin til miðsummarhaldið í Klaksvík.

# Havnarfólk útflyta grót

**Starvsfólkið á Brennistøðini hjá IRF á Hagaleiti eru vorðin innflytarar av havnargróti, hetta hóast ríkiligt er av gróti úr Norðoyartunnilinum**

RUSK

*Eirikur Lindenskov*



*Eitt sindur av havnargrótinum sum er endað á skiljibandinum hjá IRF*

Leirvík er spakuliga við at gerast miðstøð fyri grótinnflutning í Føroyum. Norðoyartunnilin legði fyri við at flyta grót upp úr dýpinum, men nú vilja havnarborgarar ikki standa aftanfyri. Hvørja viku kemur endurnýtslubilurin hjá Tórshavnar kommunu við pappíri og gróti. Pappírið verður skilt og sent av landinum, meðan grótið brýtur og oyðileggur bæði bil og skiljibondini hjá IRF.

– Hetta er ein veruligur trupulleiki, sigur Niels Uni Dam, kunningarfólk hjá Tórshavnar kommunu. Talan er ikki um rættuliga nógv grót, men um ein støðugan trupulleika. og hetta fer illa við fína nýggja bilinum hjá Endurnýtsluni, og í ringasta føri kann øll pressan á Endurnýtslubilinum fara í smildur.

Eisini IRF í Leirvík hevur stórar trupulleikar av hesum, skiljibondini eru ikki gjørd til grót, og fara tí illa, og starvsfólkið noyðist alla tíðina at vera á varðhaldi, soleiðis at grót ikki fer inn í maskinurnar og smildrar alt.

Her er sjálvandi talan um gáloysni, og ikki óndan vilja. Fólk leggja grót í botnin á ílatinum, fyri at tað ikki skal fara á flog, og tá ílatið verður tømt, fer grótið við.

Niels Uni Dam greiðir frá, at til ber at keypa serlig hongsul at seta grønu íløtini føst við, her hava Renovent framleitt eina góða loysn, sum tryggjar ílatið uttan at gera skaða á fólk ella tilfar.


J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo

WWW.SMYRIL-LINE.COM



SKÚLIN ER LIÐUGUR...

200 FYRI 200

Enda skúlagongdina við einum Mini-Cruise til Noregs fyri einans 200 krónur!

kr. 200,-

FYRI HVØNN – ØLL AVGJØLD ERU ÍROKNAÐ



Fráferð: 27. juni

Tey fyrstu fáa tey bestu kømrini, so bíleggið NÚ á 34 59 00

SMYRIL LINE

Droym tað ikki – royn tað!